fylla sundmagan á veg niður við luft fyri at fáa uppdrift. Á veg upp sleppur hann luftini fyri at fáa minni uppdrift. Av tí at prikkafiskurin hevur sundmaga, sæst hann á ekkóloddinum, sum ger tað møguligt at meta um nøgdina.

Hildið verður, at prikkafiskurin undir Føroyum gýtir vestan fyri Írland, í Irmingarhavinum, og millum Grand Bank og Flemish Cap við New Foundland. Um prikkafiskur gýtir í føroyskum sjógvi veit man ikki enn, tí prikkafiskayngul er bert skrásett einstøk ár.

**Framtíðarætlan**
Christian í Grótinum, Finnur Fríði, Høgaberg, Jupiter, Krúnborg, Nordborg, Næraberg, og Tróndur í Gøtu fara at skráseta dato, klokku, positión, troldýpi, hita í sjónum, hita á troldýpi og annað, tá teir fáa ella síggja prikkafisk. Harafturat skulu teir taka prikkafisk til lívfrøðiligar kanningar. Hetta er fyri at savna og viðgera tilfar um ein uppisjóvarfisk, ið kann gerast eitt ískoyti hjá svartkjaftatrolarunum.

## Sjókarpi - gestur úr landsuðri

Hans Eli Sivertsen úr Havn kom inn á gólvi á Fiskirannsóknarstovuni í august 2003 við einum fiski, sum hann ikki kendi. Hann hevði fingið hann í Nólsoyarfirði í juli. Tað var ikki løgið, at hann ikki hevði sæð fiskin áður, tí so vítt vit vita, er hetta fyrstu ferð, hann er fingin í føroyskum sjógvi.

Fiskurin eitur *Spondyliosoma cantharus* (L.) á latíni, danska navnið er “almindelig havrude”, á norskum eitur hann ”havkaruss” og á enskum “black seabream”. Hann hevði einki føroyskt navn, men vit hava nú nevnt hann sjókarpa. Navnið kemur av at hann er nær skildur við tær sonevndu karpurnar, og líkist teimum nógv.

Sjókarpi er sera vanligur í Miðjarðarhavinum og fram við vesturstrendurnar á Afrika og Europa, fram við landi í Norðsjónum, inni í donsku farvøtnunum og norðuri til Mið-Noregs. Hann er fingin við Hetland eisini. Svimur oftast fyri seg sjálvan, men kann ganga í torvum eisini. Er bæði niðri við botn og uppi í sjónum, á 5-300 m dýpi. Má sigast at vera summargestur á norðaru leiðunum. Sjókarpi gerst 60 cm, men er vanliga um 30 cm. Hann livir av smáum algum og ryggleysum dýrum, serliga krabbadýrum. Sjókarpi er hermafrodittur, tvs. at hann fyrst gýtur rognkorn og síðan sil. Tey gitnu rognkornini verða løgd á sandbotn. Í Suðureuropa er vanligt at eta sjókarpa, men norðanfyri verður hann ikki mettur at vera serliga góður til matna.



*Sjókarpi*

**Jákup Reinert**